Uppflytingarmøguleikin hjá Vejle longri burtur

Vejle tapti stórt á heimavølli og datt niður á sætta plássið, meðan Herfølge er sannførandi í royndini at sleppa aftur í superliguna

DANMARK 1. DEILD
Jóannes Hansen

Tað gongst einki serligt hjá Christiani Høgna Jacobsen og Vejle, sum hava sett sær fyri í hesum kappingarárinum at røkka øðrum av plássunum, sum bera rættin aftur at spæla í superliguni við sær.

Sunnudagin hevði Vejle vitjan av Ølstykke, sum leingi var oddalið í 1. deild, men sum tær seinastu vikurnar ikki hevur verið so sannførandi. Men sunnudagin bilaði einki hjá Ølstykke. Teir vóru sera sannførandi í Vejle, har heimaliðið einki hevði at siga. Ølstykke vann 4–0, og hjá Vejle varð Kern Lyhne rikin av vøllinum í 2. hálvleiki. Vejle málverjin endaði á skaðastovuni. Teir hildu, at hann kanska hevði fingið heilaskjálvta.

Ølstykke er nú nummar fýra, meðan Vejle er á sætta plássi. Bara tvey tey bestu flyta upp. Enn er nógv eftir av kappingini, men í løtuni sær tað einki serligt út hjá Vejle.

Randers Freja, sum hevur Atla Gregersen í hópinum, vann seg fram á næstfremsta plássið. Teir vóru í Valby í Keypmannahavn og spældu ímóti Frem. Bæði liðini hava higartil verið ímillum tey fremstu. Freja vann 2–1, og harvið eru teir næstovast, meðan Frem er á triðja plássi

Undan summarsteðginum var Johan B. Hansen leigaður úr OB og til Fredericia. Síðani summarsteðgin hevur Johan verið aftur í barndómsfelagnum Horsens. Sunnudagin var Johan saman við Hornsens aftur í Fredericia, og føroyski spælarin og liðfelagarnir fóru úr Fredericia við øllum. Teir vunnu 1–0.

Talan var um sannan dreym, tá Jákup Mikkelsen og Herfølge í 2000 vunnu DM. Í 2001 flutti Herfølge niður í 1. deild. Síðani varð roknað við, at tað orduliga skuldi fara í fisk hjá teimum, men teir eru drúgvir í Herfølge. Í vikuskiftinum vóru teir í Århus. Dysturin ímóti FC Aarhus varð mettur at vera sera torførur, men Herfølge vann 3–2.

HFK Sønderjylland er eisini millum feløgini, sum hevur ætlað sær upp aftur í superliguna. Teir vóru sera trilvandi nógvu tey fyrstu umførini. Men nú gongur sum eftir ánni. Sunnudagin vunnu teir 3–0 á heimavølli ímóti Hvidovre, sum er í stórum vanda at flyta niður. Sigurin var tann triði á rað hjá HFK, sum er komið fram á fimta plássið.

Málríkasti dysturin var í Hellerup, har HIK og B 1909 spældu 4–4. Í Odense vann B1913 2–0 á B93. Eitt av størstu samrøðuevnunum í donsku 1. deildini er Skjold, sum er grannalið hjá B93 á Eysturbrúgv. Lítla felagið, sum ongantíð hevur verið so ovarlaga, sum teir eru nú, skuldi í gjárkvøldið spæla ímóti einum øðrum høvuðsstaðarfelag, Brønshøj.

FCK sannførandi oddalið

Todi Jónsson var ikki við í Viborg, har Peter Møller var liðformaður og sendi seg sjálvan upp á máltindin í superliguni

ÚTISETAFELAG
Jóannes Hansen

Alt bendir á, at tað verður FCK, sum fer at halda vetrarfrí á ovasta plássinum í superliguni. Í fjør var Brøndby fremst, tá farið varð í vetrarfrí. FCK nýtti alt várið at fáa fatur á grannunum. Tað eydnaðist at vinna tey tíggju stigini innaftur, men so kiksaði tað í síðstu løtu í Parkini ímóti júst Brøndby, tá Todi Jónsson tvær ferðir varð snýttur fyri brotsspark. Tað minnast allir fótbóltshugaðir føroyingar.

Nú er FCK oddalið. Teir eru seks stig undan Brøndby. Men Todi Jónsson eigur ikki sama lut í avrikunum, sum hann átti í vár. Leygardagin var FCK í Viborg, men Todi Jónsson var ikki við. Hann fekk í síðstu viku ein lítlan skaða í lærið, og tað varð sagt at vera orsøkin til, at Todi ikki var við í Viborg.

At tað gongur upp og niður í fótbólti, og at tað ofta kemur fyri, at ein spælari, sum hevur verið ímillum teir bestu, eitt skifti er úti í kuldanum, og at ein spælari, sum hevur verið í kuldanum, aftur verður ímillum teir fremstu, er álopsfelagin og kappingarneytin hjá Toda Jónsson, Peter Møller, gott dømi um.

Tá ið FCK í vár hevði nógvan undanvind, vóru tað Todi Jónsson og Sibusisu Zuma, sum vóru álitini í álopinum. Peter Møller, sum FCK hevði keypt úr Spania, varð ikki mettur at vera styrkur, heldur varð tosað um skeiva íløgu. Men í heyst hevur Peter Møller staðiliga víst, at tað framvegis eru mál í honum.

Peter Møller hevur verið sera ágrýtin. At hann hevur havt so góðan hugburð mundi vera orsøkin til, at álopsspælarin leygardagin hevði heiðurin og álitið at vera liðformaður. Vanligi liðformaðurin í FCK, Christian Lønstrup, hevur verið skaddur og var á beinkinum, og Peter Nielsen, sum hevur verið liðformaður síðstu nógvu ferðirnar, var leikbannaður.

FCK vann 3–0 í Viborg, og Peter Møller átti stóran leiklut. Dómarin varð tøldur til at bríksla fyri brotsparki, tá eitt stórt korter var fyri. Peter Møller var farin um koll, men sjónvarpsmyndirnar vístu, at talan var um sjónleik. Thomas Røll umsetti úr ellivu metrum.

Tá ið ein lítil hálvur tími var farin, skoraði Peter Møller til 2–0. Zuma, sum hesa ferð var á miðvøllinum í høgru, legði væl innfyri. Jörgen Pettersson, sum misnýtti fleiri stórar málmøguleikar, var akkurát ov stuttur at røkka innleggjinum hjá Zuma, men við handara stólpan var Peter Møller leysur og smekkaði til.

Í 67. minutti økti Peter Møller til 3–0. Eftir innkast í høgru og eitt tvey samanspæl millum Thomas Røll og Jörgen Pettersson varð Peter Møller púra leysur, tá hann skoraði sjeynda málið í hesum kappingarárinum. Harvið er hann annar av toppskjúttunum í superliguni.

Tá knappliga tjúgu minuttir vóru eftir, varð Jörgen Pettersson skiftur út við unga miðvallaran Hjalte Nørgaard, meðan Zuma varð fluttur fram í álopið.

Todi Jónsson hevur ikki enn skrivað undir nýggjan sáttmála við FCK. Felagið er komið við nýggjum sáttmálauppskoti, og Todi dylur ikki fyri, at hann er áhugaður í at halda fram í felagnum, sum hann hevur spælt fyri í fleiri enn fimm ár.

Molde skal spæla í Europa

Í seinastu umfarinum í tippuliguni tryggjaði Sogndal sær við javnleiki í Molde enn eitt ár í bestu deildini

NOREG
Jóannes Hansen

Tað varð sum vant Rosenborg, sum gjørdist norskur meistari, men við øðrum plássinum hevur Molde í øllum førum tryggjað sær europeiska luttøku til komandi kappingarár

Norska landskappingin fór sunnudagin í vetrarfrí. Jákup Mikkelsen var á beinkinum hjá Molde. Í november hava teir frí, men longu 1. desember verður farið undir fyrireikingarnar til nýtt kappingarár.

4.850 áskoðarar møttu til heimadystin ímóti Sogndal. Dysturin endaði 3–3, og tað mundu báðir partar vera nøgdir við. Molde tryggjaði sær silvurmerkini, sum eru tey sættu síðani 1974, og Molde skal komandi ár spæla í UEFA kappingini. Í síðsta umfarinum í fjør kiksaði at vinna tey atgongumerkini.

Sogndal endaði fjórði aftast, og harvið tryggjaðu teir sær enn eitt ár í bestu deildini.

Håvard Flo legði Sogndal framum í 1. hálvleiki, tá hann gjørdist einsamallur við Eddie Gustafsson. Í 2. hálvleiki javnaði Sogndal, og heimaliðið legði seg framum 2–1 og 3–2. Seinna málið fingu teir í síðsta minutti av vanligu leiktíðini. Men í yvirtíðini javnaði Sogndal til 3–3.

Lyn hevði heimavøll í Oslo ímóti Viking úr Stavanger. Gestirnir vunnu 1–0, men høvuðsstaðarfelagið fekk bronsukrónurnar, meðan teir úr Stavanger endaðu á fjórða plássinum.

Meistararnir úr Tróndheimi vunnu 4–0 á heimavølli ímóti Brann úr Bergen. Harald Martin Brattbakk skoraði til 2–0 og 3–0. Harvið gjørdist fyrrverandi liðfelagin hjá Toda Jónsson í FCK fyri fjórðu ferð toppskjútti í tippuliguni.

Brann royndi at leggja trýst á, men tað orkaðu teir bara í ein hálvan tíma. Sjáldan munnu venjari og spælarar á liði, sum hevur tapt 4–0, hava verið í so góðum hýri, sum teir í Brann vóru eftir tapið ímóti Rosenborg. Orsøkin vóru tíðindini um, at Stabæk hevði vunnið 7–2 í Moss. Harvið var greitt, at tað var Moss og ikki Brann, sum skuldi flyta niður saman við Start úr Kristiansand, sum á heimavølli tapti 3–0 ímóti Bodø/Glimt.

Nú skal Brann spæla endaumfar ímóti Sandefjord, og íslendski venjarin í Bergen, Teitur Þórðarson, heldur, at hansara lið hevur góðar møguleikar at varðveita plássið. Tað heldur fráfarandi venjarin í Rosenborg, Nils Arne Eggen, eisini at teir í Bergen hava.

Lillestrøm, sum leingi var illa statt, endaði við sannførandi 3–0 heimasigri á Odd Grenland, og Bryne og Vålerenga spældu 2–2.

Nógv vendur framvegis skeiva vegin

Hóast Farum telist ímillum tey fremstu, so tvíheldur venjarin um, at málið er at sleppa undan niðurflytingini

SUPERLIGAN
Jóannes Hansen

Tað var hálva vegna vetrarveður í Danmark sunnudagin. Nógvi vindurin og nógva avfallið hevði við sær, at umstøðurnar at spæla fótbólt ikki vóru nakað serligar. Men kortini møttu næstan átjan túsund upp á Brøndby stadion, har heimaliðið og AaB skuldu stríðast um at varðveita sambandið við oddaliðið FCK.

At FCK leygardagin hevði vunnið 3–0 í Viborg legði eyka trýst á Brøndby og AaB. FCK sigurin var sera kærkomin. Fyrr í heyst hevði FCK tapt tvær ferðir 3–0 í Jyllandi. Fyrst taptu teir í Aalborg, og so taptu teir í Esbjerg.

AaB legði bragdliga fyri í Brøndby. Ferðin var høg, teir vóru avgjørdir í verjupartinum, og fleiri ferðir var um reppið, at teir fingu bóltin í málið, men næstan 40 ára gamli Mogens Krogh, sum í vetrarsteðginum ætlar sær úr Brøndby málinum, var tryggur.

Eftir steðgin var fótbóltsspælið betri, enn tað hevði verið. Tað luktaði leingi av málleysum javnleiki, men sjey minuttir undan leikloki stútaði Peter Madsen í málið, og so vann heimaliðið 1–0. Higartil hevur kappingarárið verið strevið hjá Peter Madsen. Hetta var bara triðja málið hjá honum. Hini skoraði hann 1. september og 6. oktober. Tað var ólíka hjá honum í farna kappingarári. Tá skoraði hann í alt 22 mál. Hann var toppskjútti saman við Kasper Dalgas, sum tá spældi við OB, men sum nú er liðfelagi hjá Peter Madsen í Brøndby.

Undan fráferðini til HM endaspælið í summar varð roknað við, at Peter Madsen fór at verða seldur uttanlands. Tað varð hann ikki, og í heyst hevur tað verið rættuliga soltið. Nú eydnaðist tað at skora mál, men trý mál í trettan dystum er neyvan nóg mikið at sannføra útlendsku feløgini, sum nú tykjast vera greið yvir, at tey hava ikki so nógvar pengar, sum tey áður hava hildið seg at havt stórfeløgum í Keypmannahavn. Brøndby og FCK eiga tvey pláss, og so siga tey í AB og Farum spurningin vera, um tey við fáum og smáum pengum skulu stríða stórt innanhýsis stríð fyri at finna fram til, hvat av teimum skal eiga síðsta plássið, ella um tey skulu kasta saman.

Um samanleggingin verður veruleiki, so verður tað mett, at einir tjúgu spælarar missa arbeiðið. Sovorðið prát átti at havt verið óheppin upphiting til týdningarmiklan landskappingardyst. Men Farum spælararnir lótust ikki um vón, tá teir høvdu vitjan av FCM. Kanska eru tað royndirnar úr Lyngby, har alt í fleiri ár var sera buldraligt, sum hevur lært Farum spælararnar, hvat teir skulu taka sær av og ikki. Fleiri teirra hava spælt í Lyngby.

Farum vann heimadystin 1–0, og teir eru á fjórða plássinum. Men gamli AB venjarin og núverandi Farum venjarin, Christian Andersen, vil ikki hoyra um Europa Cup luttøku og meiri av tí slagnum:

– Málið fyri hetta kappingarárið er at røkka teimum 30 til 33 stigunum, sum vit rokna við skulu til, um tað skal sleppast undan niðurflytingini, sigur hann.

Kappingarárið er ikki hálvrunnið enn, so tað kann ikki sigast annað, enn at teir í Farum eru tætt at málboksaði í nakkan á einum viðspælara, og so sigldi bólturin í málið!

Fyri stuttum varð nógv tosað um, at Køge vann undirhaldandi uppgerð í Esbjerg 4–3. Sunnudagin var Esbjerg í Køge, og teir fóru til hús við 4–1 sigri. Hetta var fimta ferðin av seks royndum í hesum kappingarárinum, at Køge tapti á heimavølli.

Farum heldur fram

Í síðstu viku snúði fótbóltsprátið í Danmark seg ikki minst um, at AB og Farum ganga í giftitonkum. Feløgini ávikavíst í útjaðaranum og norðanfyri danska høvuðsstaðin eru illa sperd figgjarliga. Tey siga seg vera komin til ta niðurstøðu, at tað er ikki pláss fyri fleiri enn trimum inum. Saman við Brøndby og Esbjerg, sum eru nummar tvey og trý, hava teir 21 stig.

AB er í tungum sjógvi. Teir spældu málleysan illveðursdyst í Odense. Higartil eru bara tveir dystir hetta kappingarárið endaðir málleysir. OB var annað vikuskifti á rað partur í málleysari uppgerð.

Silkeborg úr botninum

Heilt síðani kappingarbyrjan hevur Silkeborg verið botnlið. Tað eru teir ikki meiri. Sunnudagin vunnu teir á heimavølli 2–1 ímóti AGF, sum bara hevur fingið trý stig burturúr fimm teimum seinastu royndunum.

Fyri fyrstu ferð síðani fyrsta umfarið í hesum kappingarárinum eydnaðist tað AGF at fáa fyrsta málið. Men Silkeborg javnaði, og tá teir fingu sigursmálið, var AGF leikluturin óheppin. Málverjin hjá teimum undirhaldandi uppgerð í Esbjerg 4–3. Sunnudagin var Esbjerg í Køge, og teir fóru til hús við 4–1 sigri. Hetta var fimta ferðin av seks royndum í hesum kappingarárinum, at Køge tapti á heimavølli.

Tað luktaði leingi av málleysum javnleiki, tá argastu kappingarneytarnir hjá FCK hittust, men sjey minuttir fyri leiklok eydnaðist Peter Madsen at skora, so Brøndby vann 1-0 á AaB

Danska superligan

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	FCK	13	8-3-2	21	15	6	27
2	Brøndby (M)	13	6-3-4	24	15	9	21
3	Esbjerg	13	6-3-4	29	25	4	21
4	Farum	13	7-0-6	18	17	1	21
5	AaB	13	6-1-6	19	19	0	19
6	OB (S)	13	5-3-5	19	16	3	18
7	FCM	13	4-4-5	16	19	-3	16
8	Køge	13	5-1-7	22	27	-5	16
9	Silkeborg	13	4-3-6	16	18	-2	15
10	AGF	13	4-3-6	18	23	-5	15
11	Viborg	12	3-5-4	20	22	-2	14
12	AB	13	3-5-5	14	17	-3	14

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

		d	v - j - t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Herfølge	13	9-1-3	30	20	10	28
2	Randers F.	13	8-1-4	28	19	9	25
3	Frem	13	7-3-3	29	22	7	24
4	Ølstykke	13	6-4-3	32	27	5	22
5	HFK Sønderj.	13	6-3-4	30	24	6	21
6	Vejle	13	6-3-4	19	19	0	21
7	Skjold	12	6-2-4	24	12	12	20
8	Fredericia	13	5-4-4	19	15	4	19
9	B 1913	13	5-3-5	20	22	-2	18
10	Brønshøj	12	4-4-4	15	13	2	16
11	FC Aarhus	13	5-1-7	23	23	0	16
12	AC Horsens	13	4-3-6	20	23	-3	15
13	B93	13	4-1-8	19	25	-6	13
14	Hvidovre	13	3-3-7	14	28	-14	12
15	B 1909	13	2-4-7	22	31	-9	10
16	HIK	13	2-2-9	13	34	-21	8

Føroyskir leikarar: Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Atli Gregersen (Randers Freja), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

Norska tippeligan

		d	v	- j	- t	v mál	t mál	+/-	stig
1	Rosenborg (M)	26	17	- 5	-4	57	30	27	56
2	Molde	26	15	- 5	-6	48	26	22	50
3	Lyn	26	14	- 5	-7	36	29	7	47
4	Viking	26	11	-11	-4	44	31	13	44
5	Stabæk	26	12	- 6	-8	48	34	14	42
6	Odd. Grenl.	26	12	- 5	-9	36	30	6	41
7	Lillestrøm	26	10	- 6	-10	37	30	7	36
8	Vålerenga	26	7	-12	-7	38	31	7	33
9	Bryne	26	8	- 7	-11	38	39	-1	31
10	Bodø/Glimt	26	9	- 4	-13	38	41	-3	31
11	Sogndal	26	8	- 6	-12	37	51	-14	30
12	Brann	26	8	- 3	-15	35	52	-17	27
13	Moss	26	6	- 6	-14	32	49	-17	24
14	Start	26	2	- 5	-19	21	72	-51	11

Føroyskir leikarar: Jákup Mikkelsen (Molde)